# Helen Hansen 70 ár



Hon hevur búð í Danmark í meira enn hálvthundrað ár, og pápin var dani. Men Hella er fødd og uppvaksin í Føroyum, hon er suðuroyingur. Og hon er vágbingur. Tað hoyrir tú beinanvegin, hon letur munnin upp. Og Hella er røsk at práta, veit eisini nógv at práta um og hevur gjørt seg kunna við so nógv ymisk viðurskifti í samfelagnum. Serliga kunnug er Hella við viðurskiftini hjá teimum, ið liva á lívsins skuggasíðu.

Hella hevði búð leingi í Danmark, áðrenn vit fingu nakað Hotel Tórshavn í Keypmannahavn. Tað eru ikki so fáir sjúklingar, ið eru farnir úr Føroyum til Danmarkar, sum hava kent fløvan av hennara hjálpandi hondum, og sum hava funnið vegin til tær opnu dyrnar í Værløse.

Góða Hella. Vit báðar, sum á henda hátt heilsa tær á sjeyti ára degnum, eru bara tvær av teimum mammunum, sum tú uggaði á sjúkrahúsferð í Danmark við ófullførum børnum. Tú møtti foreldrum, sum fingu børn síni heim aftur við sær, og eisini foreldrum, sum máttu lata síni børn verða eftir í Danmark, tá tey sjálv fóru heim aftur. Tú hevur mangan verið í móður stað, eisini sitið á songarstokkinum, tá hjálparleys børn og vaksin hava latið eyguni aftur fyri seinastu ferð.

Á sjeyti ára degi tínum hevur tú so søtliga uppiborið eina hjartans tøkk frá tínum landsmonnum fyri títt stóra arbeiði ímillum tey, ið ikki við orðum eru før fyri at takka fyri hjálpina.

Tá JAVNI, landsfelagið evnaveikum at bata, var stovnað í 1971, teknaði tú teg til lim í felagnum. Og tín partur lá ikki eftir, tá felagið fór til verka. tú kendi persónliga nógvar av teimum føroyunum, sum búðu á stovnum í Danmark, og onkur hevði eisini búð á Ebberødgård, tá sonur tín búði har, hóast tey flestu eftir 1959 búðu á Rødbygård. Tú kendi nógv føroysk foreldur, og tú kendi tey starvsfólk í Danmark, sum dagliga vóru um tey. Tú vart føroyingur og kendi til føroysk viðurskifti. Tí vart tú mangan góð at heita á og til stóra hjálp fyri felagið Javna. Og vit minnast fyrilestrarnar, tú hevði fyri okkum her heima.

Hvør er so henda konan, sum nú fyllir sjeyti ár? Hella er fødd í Vági, fødd uppi á kvistinum á kafenum, hevur hon sjálv sagt í eini samrøðu í 1995. Mamman varð rópt Andrea á Kafenum. Hon var dóttir Julius í Smillum og Elsebeth Katrinu, ættað úr Fuglafirði. Pápi Hellu var vanliga róptur Jydin á Smyril. Simoni Frederiksen var bóndasonur og skuldi festa garð nærhendis Skagen. Men hugur hansara stóð til sjógvin, og hann endaði so í Føroyum, sigldi við ymiskum skipum og var í eini 10 ár fýrbøtari umborð á »Smyrli«, haðani navnið. Tær vóru bara tvær systrar, Hella og Kamma, og báðar giftust til Danmarkar. Foreldrini fluttu eisini niður at búgva.

Hella var bert 17 ára gomul, tá hon og Hilmer funnu saman. Og fýra ár seinni vóru tey vígd í Vágs kirkju. Hella var tá útbúgvin barnasjúkrasystir og maðurin verkfrøðingur. Tey fingu trý børn og ættleiddu eisini eina gentu. Tá Hella og Hilmer bæði hava verið so virkin í arbeiðinum fyri teimum minni mentu, so er tað tí, tey kenna so væl, hvussu hesi menniskju altíð hava verið fyri vanbýti í samfelagnum. Hella hevur talað og skrivað nógv um kor teirra evnaveiku. Í 1976 kom út bók hennara um sonin Calla, har hon í fororðunum skrivar: Jeg har skrevet denne bog dels fordi jeg ikke kunne lade være, og dels fordi jeg har følt det som en pligt at give min viden videre, bl.a. til de forældre, hvis verden mere eller mindre er styrtet i grus ved konfrontationen med den kendsgerning, at deres barn aldrig vil blive som andre.

Umframt elsta sonin so var ættleidda dóttirin eisini brekað og hjálparleys. Men bæði tey yngru børnini og maðurin hava staðið undir liðini á Hellu, og uttan teirra stuðul var neyvan komið so nógv av skafti hjá henni í stríðnum at bøta um korini hjá teimum ófullføru.

Vit, sum hava funnið vegin til Åsevej í Værløse, vita, at Hella hevði ikki kunnað tikið ímóti so nógvum fólki í sínum heimi, um ikki Hilmer og børnini vóru, sum tey vóru, hjartalig og blíð eins og Hella sjálv. Og øll skiltu tey føroyskt, so tá føroyingar vitjaðu, varð bara tosað føroyskt. Dóttirin er nú gift í Noregi og eigur tvey børn. Yngri sonurin býr ikki so langt frá foreldrunum við konu og trimum børnum, sum altíð kunnu koma til ommuna og abban. Og Calle, sum býr í sambýli í Jonstrup, vitjar foreldrini heima og tey hann, har hann býr.

Hella verður nú 70 ár. Hilmar er nøkur ár eldri. Tey eru ikki meira á lønandi arbeiðsmarknaðinum, men ongantíð arbeiðsleys. Í meira enn 25 ár arbeiddi Hella á somu vøggustovu. Hon gavst ikki, fyrr enn hon fall fyri aldursmarkinum. Men tá fekk hon meira tíð at gera sjálvboðið arbeiði, har tørvur var á tí. Og nú hevur Hella sítt fasta arbeiði í Mariukirkjuni, ið ger eitt stórt arbeiði ímillum narkomanar mitt inni í Keypmannahavn. Tað var ikki tað lættasta arbeiðið, Hella valdi sær sum pensionistur. Men tað høvdu vit, skum kenna hana, heldur ikki væntað.

Góða Hella. Tá tað ikki ber okkum báðum til at koma í konugildi, so fara vit á henda hátt at ynskja tær hjartaliga til lukku við 70 ára føðingardegnum tann 27. juni, og vit biðja um Harrans signing yvir teg og tíni og tað arbeiðið, tú gert. Trúgv hava tit verið, tú og Hilmer, at vitja henda veg, og vit vænta eisini at síggja tykkum her einaferð seinni í summar.

**Poula og Helena**




## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi tá góði maður, pápi, verpápi, abbi og sonur okkara

**Petur Joensen**
Eiði

doyði og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*

**Jóna, Tom, Gurið, Durita og Alisa**



Tórshavnar býráð tíðindafund:

# Persónur skyldar 1,5 mió í skatti

**Bussleiðin hjá Tórshavnar býráð verður í næstum boðin út. Leiðirnar skulu gerast til betri tænastu fyri borgararnar. Eisini ætlar býráðið at fáa hendur á skattainnkrevjingini frá landinum. Einkult persónur skyldar Tórshavnar býráð 1,5 millión**



*Jan Christiansen, borgarstjóri, er als ikki nøgdur við, at Tórshavnar Kommuna ikki fær allar skattainntøkurnar, ið kommunan hevur krav uppá. Hann vil nú hava umsitingina aftur til býráðið.*
*Mynd: Finnur Justinussen.*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
*Heri á Rógvi*

Tórshavnar býráð hevði hóskvøldið býráðsfund og fríggjamorgunin var so ein tíðindafundur á skránni, har borgarstjórin greiddi nærri, hvørja avgerðir og hvørji mál býráðsfundurinhevði at bjóða.

Eitt mál, sum hevur verið nógv frammi seinastu dagarnar, er málið við Bussleiðini hjá Tórshavnar býráð. Bussleiðin verður í næstum boðin út. Tekniska nevnd í býráðnum hevur fyrireikað útbjóðingartilfar, sum er tøkt nú hjá øllum, ið hava hug at bjóða. Hetta er í tráð við nýggju kommunulógini, ið talar fyri, at allar uppgávur skulu øll javnt bjóða uppá.

Við verandi skipan eru tað fýra veitarar, sum røkja bussleiðina fyri kommunan, og hesir hava verið teir somu síðani bussleiðin byrjaði at virka fyrst í áttatiárunum. Sáttmálin er endurnýggjaður á hvørjum árið. Netto kostar tað Tórshavnar býráð ellivu milliónir um árið at reka bussleiðini. Brutto er kostnaðuri 14 mió, har tríggjar milliónir eru inntøka av billettum.

Leiðirnar verða bodnar út hvør sær. Soleiðis at skilja, at talan er um fýra leiðir, sum dekka allan býin og eisini Kaldbak og Kollafjørð. Ein veitari kann tó bjóða upp á allar leiðirnar. Hetta verður eisini gjørt fyri at staðfesta ábyrgdina. Veitararnir fáa eitt gjald fyri teir tímar, teir koyra, og býráðið fær allar inntøkurnar frá koyringini.

Um dagin skal tað framvegis vera so, at hálvur tími er millum fráferðini, men um kvøldið verður hetta til ein tíma. Leygardag verður bert koyrt til kl. 17, og sunnudag verður als ikki koyrt. Hetta ger býráðið, tí kanningar vísir, at hesa tíðir koyra ógvuliga lítið av fólki við býarbussunum. Sunnudagar koyra millum 60-100 fólk við bussunum.

Eisini setir býráðið tey krøv, at bussarnir skulu vera í góðum standi, og talan skal vera um nýggjar bussar, sum eru lágir, so lætt er at koma í teir.

Jan Christiansen veit ikki at siga, um teir fara at spara nakrar pengar, tí teir seta eisini stór krøv, men hann heldur hesa skipanina fara at verða góða, tí talan er um eina einkla og góða skipan. Býráðið fer eisini at keypa eitt nýggja elektroniska billetskipan, sum verður nýtt í staðin fyri verandi skipan í framtíðini. Vert er eisini at nevna, at býráðið sigur seg hava funnið fram, at billetprísurin við bussleiðunum er lítil samanborið við onnur lond.

Tilboðini skulu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 15. august.

### Skattur

Býráðið í Tórshavnar Kommunu er ógvuliga misnøgt við skattainnkrevjingina. Býráðið kenni seg vera illa viðfarið, tí borgarar hjá kommununi skylda kommununi nógvar milliónir, men pengarnir koma ikki inn, og hetta heldur býráðið skyldast Toll- og Skattstovuni, sum tey meta hevur lyndi til at eftirgeva skuldina. Jan Christiansen sigur tað vera sera trupult hjá býráðnum at leggja ætlanir, tá teir ikki vita heilt, hvussu nógv kemur inn.

Fúlasta dømið, ið eisini var fyri á býráðsfundi, er ein borgari í kommununi, ið er vinnurekandi,og hann verður sagdur at skylda Tórshavnar Kommunu 1,5 mió kr. Orsøkin verður søgd at vera, at persónurin ikki hevur givið upp. Navnið á persóninum varð tó ikki upplýst fyri almenninginum.

Tórfinn Smith, býráðslimur, sigur, at spurningurin viðvíkjandi skattainntøkunum fyri fyrstu ferð varð reistur í 1997. Hin 9. januar 1997 varð gjørt upp, at 1130 persónar skyldaðu kommununi 85 mió kr. í skatti. Harav skyldaðu 373 teirra 84 mió. Trupulleikin er ikki minkaður, stendur at lesa í frágreiðingin frá býráðsfundinum hóskvøldið.

– Býráðið átalar harðliga skeivur gongdina og biður um, at líkningarmyndugleikin, og skatta innkrevjingin verður flutt aftur til kommununa skjótast gjørligt, stendur at lesa í skrivi til landsstýrismannin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, frá Tórshavnar býráð.

### Ídnaðarøkið

Tórshavnar Kommuna samtykir eisini á fundi hóskvøldið at gera eina útstykkingarætlan í Skarðshjalla, sum er beint norðanfyri Sandvíkarhjalla.

Talan er um yvir 50.000 fermetrar, og jørðin skal keypast frá Jarðarráðnum. Prísurin á jørðini er einar 50 kr/fermeturin. Arbeiðið verður gjørt í trimum stigum, og tá verður talan um eitt veruligt ídnaðarøkið á Hjalla.

